# Eitt flott punktum

**Lagið var í toppi. Diskussiónirnar um farna kappingarárið fingu góða rúmd, og steyp og blómur skuldu sjálvandi handast teimum røttu, tá hondbólturin hevði sítt gallakvøld um vikuskiftið**



*Joan Midjord Djordjevic, Agnar Joensen og Daiva Toumaite vórðu kosin bestu spælararnir í farna kappingarárinum*

## Fjølmiðlaliðið

Til gallkvøldið høvdu fjølmiðlarnir eisini fingið loyvi at spæla sær eitt sindur við tankanum um at seta sítt egna lið saman. Úrslitið av hesum arbeiði, sum Dimmalætting og Sosialurin stóðu fyri, vóru hesi lið.

**Hjá kvinnum**

| | |
|---|---|
| Málverji | Helena Dam Poulsen |
| Vinstri vongur | Anna Kristina Samson |
| Vinstri bakkur | Daiva Toumaite |
| Miðspælari | Aukse Vysniaskaite |
| Strikuspælari | Una Olsen |
| Høgri bakkur | Nicoleta Radu Hansen |
| Høgri vongur | Rannvá Augustinussen |
| Venjari | Flemming Raben |

**Hjá monnum**

| | |
|---|---|
| Málverji | Eli Müller |
| Vinstri vongur | Harald Bjørgvin |
| Vinstri bakkur | Sámal Joensen |
| Miðspælari | Alexandur Johansen |
| Strikuspælari | Agnar Joensen |
| Høgri bakkur | Leivur Justinussen |
| Høgri vongur | Josef Abrahamsen |
| Venjari | Dia Midjord |

**Dómarar** Hannis Wardum & Uni Wardm

## Tey bestu

Hesi vórðu av spælarunum sjálvum kosin sum tey bestu í nú lidna kappingarárinum

**Toppskjúttar**

| | |
|---|---|
| Kvinnur | Daiva Toumaite, VB |
| Menn | Damir Oros, Neistin |

**Ársin málverjar**

| | |
|---|---|
| Kvinnur | Guðrun í Lágabø, Kyndil |
| Menn | Marian Cirloganescu, StÍF |

**Ársins verjuspælarar**

| | |
|---|---|
| Kvinnur | Marjun Tróndarson, Neistin |
| Menn | Borgar Danielsen, StÍF |

**Ársins álopsspælarar**

| | |
|---|---|
| Kvinnur | Daiva Toumaite, VB |
| Menn | Sveinur Justinussen |

**Ársins stjørnuskot**

| | |
|---|---|
| Kvinnur | Rebekka Justinussen, StÍF |
| Menn | Rókur Akralíð, Kyndil |

**Ársins dómarapar**

Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**Ársins venjarar**

| | |
|---|---|
| Kvinnur | Aivaras Daugis, VB |
| Menn | Dia Midjord, VÍF |

**Ársins spælarar**

| | |
|---|---|
| Kvinnur | Daiva Toumaite, VB & Joan M. Djordjevic, Stjørnan |
| Menn | Agnar Joensen, VÍF |

GALLAKVØLD

*Jákup Mørk*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Karmurin um gallakvøldið var hesaferð HB-húsið í Gundadali, og hóast stuttu freistina, so vóru nærum 200 gestir við borðið, tá Hilmar Jan Hansen setti gongd á borðhaldið.

At freistin hevði verið somikið stutt, komst av, at gallakvøldið í ár var í veruligum vanda fyri at verða avlýst. At enda tók dómarafelagið tó um endan, og upp á rekord-tíð høvdu tey riggað kvøldið til. Og tað kann sláast fast alt fyri eitt, at talan var um gott fyrireikingararbeiði.




*Torbjørn Jacobsen alias Hilmar Jan Hansen – ella var tað øvut. Í øllum førum helt originala útgávan talan vera um frálíkt skemt*

### Rørdur vinnari

Í allar mátar var talan nevnliga um eitt frálíkt kvøld hjá luttakarunum. Skemtið var í hæddini, tá Hilmar Jan hevði eina parodi upp á Torbjørn Jacobsen, ið helt eina røðu um importeraðu donsku dagdvøljuna, sum hondbóltur jú er, og so vóru tað sjálvandi eisini handanir av ymsum slag, sum vóru á skránni.

Tað var kanska væntandi, men við trimum steypum má sigast, at Daiva Toumaite hjá VB gjørdist stóri vinnarin á kvøldinum. Hon varð longu undan kvøldinum besti málskjúttin í kvinnudeildini. Hartil fekk hon eisini heiðurin sum besti álopsleikarin í kvinnudeildini, og sjálv onnur varð hon so eisini kosin ársins leikari í kvinnudeildini. Hendan seinasta heiðurin mátti hon tó eisini býta við Joan Midjord Djordjevic úr Stjørnuni, sum hevði fingið eins nógvar atkvøður. Hartil kann nevnast, at Daiva varð kosin triði besti verjuspælarin, so tað er neyvan at taka munnin ov fullan, um sagt verður, at hon hevði stóran týdning fyri gullið hjá VB-kvinnunum í ár.

Hjá monnunum var meira javnt býtt, men fagnaðurin var stórur, tá ársins spælari varð kosin. Hesin varð í ár Agnar Joensen hjá VÍF, sum hevur havt eitt framúr kappingarár, og tað var ein sjónliga rørdur Agnar, sum gekk upp á pallin at fáa steyp og rósur. Sum einasti av spælarunum tók hann eisini mikrofonina og gav eina tøkk til teirra, sum høvdu atkvøtt fyri sær, áðrenn hann at enda gav Inga Olsen heiðurin fyri, at hann kundi gera somikið nógv um seg á strikuni, sum hann hevur gjørt í ár.

Og so var bara eftir at hugna sær. Og tað varð eisini gjørt. Tað mundi væl og virðiliga verið farið at lýsa, tá seinastu gestirnir fóru heim, men tá høvdu tey so eisini sett eitt ordans punktum fyri enn einum hondbóltsárið.



*Borðhaldið gekk av tí allarbesta, og sangurin mundi runga um allan Gundadal*